## Fullteknað til evnisdag

Áhugin fyri støðuni hjá fólki við sálartrupulleikin og teirra avvaraðandi tykist sera stórur. Í øllum føri er onki pláss eftir til evnisdagin »At síggja við hjartanum«, sum Sinnisbati og Psykiatriski Depilin skipa fyri nú leygardagin 1. mars. Ætlanin við degnum er fyrst og fremst at varpa ljós á støðuna hjá avvaraðandi at sálarsjúkum, men hetta er eisini byrjanin til eina verkætlan, hvørs endamál er at betra um umstøðurnar og tilboðini til avvarðandi hjá fólki við sálartrupulleikum. Til ber at lesa meir verkætlanina á sinnisbati.fo



## Vil hava sjúklingagjald

Í Grønlandi halda Hans Enoksen, landsstýrisformaður, og einstakir aðrir politikarar, at fólk, ið líða av vælferðarsjúkum, og kvinnur, ið beinleiðis medvirka til egna fosturtøku, eiga at gjalda fyri viðgerðina í sjúkrahúsverkinum. Fólk, sum starvast í heilsuverkinum, halda kortini lítið um uppskotið. Tey mæla ístaðin politikarunum til at leggja størri dent á tað fyribyrgjandi arbeiðið, tí tað gevur úrslit. Brúkaragjald er ikki nøkur loysn, siga tey.

# Í holt við skúladepil sum skjótast



*Skúlamiðdepilin í Marknagili skal fíggjast innanfyri íløgukarmin hjá landsstýrinum, sigur Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í mentamálum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Stóra skúlamiðdepilsætlanin í Marknagili skal nú fremjast. Skúladepilin verður boðin út sum ein samlað verkætlan, har allir tríggir skúlarnir verða bygdir í senn, tó skal størstur dentur leggjast á studentaskúlan**

SKÚLABYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Farast skal undir skúlamiðdepilin í Marknagili sum skjótast.

Tað stóð greitt eftir fundin millum landsstýriskvinnuna í mentamálum, Kristinu Háfoss, og teir tríggjar skúlastjórarnar, Reidar Nónfjall, Handilsskúlin, Egon Øregaard, Tekniski skúli og Mikkjal Helmsdal, Studentaskúlin.

- Allir partar eru samdir um, at fara undir størstu skúlaverkætlan nakrantíð, sum skjótast, sigur Kristina Háfoss.

Við hesum verður vent aftur til upprunaligu ætlanina, um at byggja allar tríggjar skúlarnar skúlarnar í senn. Talan er um nýggjan handilsskúla, nýggjan tekniskan skúla og ikki minst nýggjan studentaskúla.

Ætlanin er, at studentaskúlin skal fáa fremstu raðfestingina, og hann skal ætlandi verða liðugur á sumri 2011. Handilsskúlin og tekniski skúli verða eitt sindur seinkaðir í mun til upprunaligu ætlanina og verða væntandi lidnir á sumri 2012. Men tað verður kortini endaliga projekteringin sum ger av, nær hvørjir partar av verkætlanini skulu verða lidnir.

Landsstýriskvinnan fer – vónandi í komandi mánaði, sambært henni sjálvari – at bera eina verklagslóg í løgtingið, sum umfatar allar tríggjar skúlarnar, sum skulu byggjast í Marknagili.

Samlaði kostnaðurin er mettur til umleið 400 milliónir krónur, umframt einar 50 milliónir til innbúgv.

Við Rás2 segði Kristina Háfoss, at tað alla tíðina hevði verið ætlanin, at skúlaverkætlanin var ein eind við øllum trimum skúlunum.

Hon segði í síðstu viku, at studentaskúlin hevði fremstu raðfesting, og tað skapti nakað av ørkymlan hjá teimum, ið vara av tekniska- og handilsskúlanum, men hesum vísti landsstýriskvinnan aftur.

- Tað er helst komin ein misskiljing í tey úttalisli, sum hava verið. Tað hevur alla tíðina ligið í kortunum, at talan var um eina verkætlan við øllum trimum skúlunum, og at studentaskúlin skuldi vera við í hesi eindini, segði Kristina Háfoss.

Landsstýriskvinnan sigur tað verða neyðugt, at finna nýggj fyribilshølir til studentaskúlan, tí arbeiðseftirlitið hevur sett so hørð krøv til verandi hølir, at vandi er fyri, at fýrahundrað næmingar standa úti á gøtuni, áðrenn man veit av.

- Ætlanin er so, at næmingarnir skulu flyta úr hesum fyribils hølunum og inn í nýggja skúlamiðdepilin í Marknagili, so hvørt sum hevi høli verða klár, segði Kristina Háfoss.

Kostnaðurin verður mettur til 400 milliónir krónur umframt innbúgv og útgerð, og landsstýriskvinnan sigur, at fíggingin skal finnast innan fyri íløgukarmarnar hjá landsstýrinum.

-Tá skúlamiðdepilin stendur liðugur í 2012, skal fíggingin eisini vera avgreidd og skúlin goldin, segði Kristina Háfoss við Rás2.

## Kjølsvín fyribyrgja oljudálking

**Fyri at minka um dálking av olju, broytti Tórshavnar kommuna tann 1. januar 2008 reglugerðina fyri bátapláss**

OLJUDÁLKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nú skulu allir bátar í Tórshavnar Kommunu hava eitt kjølsvín liggjandi í bátinum*

*Mynd: Jens Kristianm Vang*

Tórshavnar Býráð hevur tikið stig til at forða fyri oljudálking í havnum í kommununi. Býráðið hevur samtykt at broyta eina reglgerð fyri bátapláss soleiðis, at tað nú er krav, at báteigarar hava eitt sonevnt kjølsvín í bátinum.

Kjølsvínini hava tann eginleika, at tey kunnu súgva olju burtur úr sjógvi. Mett verður at kjølsvín, sum kunnu taka 2-4 litrar av olju eru hóskandi.

Um eingin óvanligur leki ella líknandi er, kundi tað verið, hóskandi at skift kjølsvínið einaferð um árið.

Eini 630 bátapláss eru í kommununi, so bert nakrir dropar frá hvørjum báti, kunnu dálka rímiliga nógv, skrivar Tórshavnar Kommuna á heimasíðu síni.